## Qaqortoq fær borgarstjóran

Kommunurnar, sum eftir ætlanini skulu leggjast saman í eina stóra suðurgrønlendska kommunu, eru vorðnar samdar um, at borgarstjórin í nýggju kommununi skal hava sæti í Qaqortoq. Harumframt skulu kommunustjórin, skrivarin og fíggjardeildin halda til í býnum. Qaqortoq verður tann størsti býurin í suðurgrønlendsku stórkommununi. Aðrir býir eru Narsaq og Nanortalik, sum skulu hýsa eitt nú skúlaverkinum, mentanini og vinnuumsitingini.



*Qaqortoq verður kommunalur høvuðs ýur í Suðurgrønlandi (Mynd: KNR)*

## Grønlendskt avlop

Grønlendska reiðaríið Royal Arctic Line hevði 33,4 mió. krónur í avlopi í fjør fyri skatt og 23,3 mió. krónur eftir skatt. Tað er væl minni enn í 2006, tá avlopið var 57,7 mió. krónur eftir skatt. Inntøkan í fjør var 793 mió. ímóti 752 mió. krónum í 2006. Úrslitið í fjør gjørdist frægari, enn leiðslan hevði væntað, og komst tað av, at skipini høvdu meiri farm at flyta seinna hálvár enn væntað. Men strandfarasiglingin var eisini dýrari enn væntað, sigur KNR.

# Frithleif sagt sínum lívsver

**- Tað krevur gjølliga umhugsan, tá ið avgerð skal takast um at sleppa sínum lívsverki. Hinvegin er neyðugt at seta upp teir karmar sum gera, at samanhangur er í tí dagliga, segði Eyðfinn Egholm, stjóri á Tórshavnar Skipasmiðju, tá ið Frithleif Olsen segði farvæl á FJM seinasta fríggjadag**



### FAKTA

FJM, sum er maskinverkstaðurin við Fjøruvegin í Runavík, er stovnað í 1986, og í fleiri ár átti felagið hølini, har SD-Beding er í dag. Fyri nøkrum árum síðan keypti felagið stóra og rúmliga bygningin, har Eysturoyar Heilsøla áður húsaðist. Gólvhæddin í hesum bygningi er heili 2450 fermetrar, umframt skrivstovuhølir, matarhøll og onnur høli í ovaru hæddini, har Sjókaféin eisini húsast.

Í bygninginum er pláss fyri øllum virkseminum hjá felagnum á einum staði, og tað er eisini ein stórur fyrimunur, at hesin bygningur eins og hin gamli, sum felagið upprunaliga átti, liggur dygst við havnalagið í Runavík. Høvuðspersónurin aftanfyri FJM hevur síðan byrjan verið Frithleif Olsen í Rituvík.

Við endan av 2004, tá ið FJM í Runavík og Tórshavnar Skipasmiðja avgjørdu at leggja saman frá 1. januar 2005 at rokna, vóru teir fýra, ið áttu felagið við Frithleifi sum høvuðspartaeigara. Hinir tríggir vóru Jóhan Hendrik Olsen, Petur Jacob Petersen (Dakko) og Arni Carlsen.

Maskinverkstaðurin hevði í eitt langt áramál samstarvað við Tórshavnar Skipasmiðju, og nú varð hildið, at tíðin var komin til samanlegging.

Partarnir hildu, at ein slík samanlegging hevur stóran týdning fyri kappingina við umheimin. Mett varð, at við dygdunum hjá starvsfólkunum gjørdist førleikin at veita fiskivinnuni á landi og skipaflotanum annars heildarloysnir uppaftur størri enn áður.

Uppgávan hjá FJM hevur øll árini verið at veita fiskivinnuni ymiskar loysnir - og heildarloysnir - úr rustfríum stáli. Felagið hevur lagt seg eftir nýhugsan og at menna nýggjar vørur úr rustfríum stáli - við bondum, pavnum og framleiðslutólum til fiskiídnaðin.

FARVÆL
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Seinasta fríggjadag var móttøka í Sjókaféini í Runavík, sum heldur til í bygninginum, har FJM hevur sína smiðju og sítt virksemi.

Móttøkan var skipað í sambandi við, at Frithleif Olsen, ein av stovnarunum av FJM, fór frá sum stjóri og gevst í fyritøkuni, sum hann saman við øðrum legði lunnar undir.

Fyri nøkrum árum síðan varð fyritøkan FJM løgd saman við Tórshavnar Skipasmiðju, sum í dag eigur og rekur smiðjuvirksemi í Havn, Runavík, Vestmanna og á Skála.

Eini 100 fólk vóru møtt til móttøkuna í Runavík, har borðreitt varð við ábiti og onkrum leskandi.

Stjórin á Tórshavnar Skipasmiðju, Eyðfinn Egholm, segði nøkur orð, og tað gjørdi Frithleif Olsen eisini.

Sosialurin hevur roynt at fáa í lag prát við Frithleif Olsen, sum umframt at hava verið stovnari og stjóri í FJM, eisini er nevndarformaður í Eik Banka, men Frithleif er í løtuni uttanlands, og nýggja telefonin hjá honum kann ikki røkkast.

### Ikki stundir

Við móttøkuna segði Eyðfinn Egholm, at Frithleif hevur valt at gevast, tí hann hevur so nógv onnur ting at takast við, og tískil heldur hann ikki, at tíðin røkkur til.

- Kanska tí, at Frithleif sjálvur hevur valt hesa gongd, er hetta ein serligur dagur hjá honum, helt skipasmiðjustjórin fyri.

Hann vísti á, at hevði hetta verið í Danmark, høvdu fólk ivaleyst sagt, at fyritøkan hjá Frithleifi í sínari tíð byrjaði sum eitt kjallaravirki, men í hesum føri var talan meira at kalla um eitt neystavirki – og síðan eitt garaguvirki fram til tað, sum vit síggja í dag.

Eyðfinn segði seg ikki kenna søguna aftanfyri virksemið hjá Frithleifi og FJM nóg væl.

- Men eg veit, at tað er ikki bara fyritøkan hjá honum, sum er ment øll hesi ár. Frithleif sjálvur er eisini mentur – og nú so mikið, at hann ikki longur hevur stundir at taka sær av fyritøkuni, segði hann við einum brosi.

Skipasmiðjustjórin vísti á, at Frithleif hevur fleiri álitisstørv, og í seinastuni hava vit hoyrt um, hvussu hann sum nevndarformaður í Eik Banka hevur verið við til at skrivað søgu við at vinna bankanum besta úrslit nakrantíð.

### Lyklapersónur

- Tað krevur sjálvandi gjølliga umhugsan, tá ið avgerð skal takast um at sleppa lívsverkinum. Hinvegin er neyðugt at seta upp teir karmar sum gera, at samanhangur er í tí dagliga. Lívið er jú annað enn arbeiði.

Eyðfinn vísti á, at nú Frithleif gevst, fær onkur annar møguleikan at royna seg og taka á seg størri ábyrgd, og tað kann eisini vera positivt.

- Tá ið ein av lyklapersónunum fer úr eini fyritøku sum FJM, sum í stóran mun byggir á tað, sum á nútímans máli kallast netverk, er uppgávan at finna eina loysn soleiðis, at netverkið framvegis er so fullkomið sum gjørligt.

Skipasmiðjustjórin segði seg hava tosað nógv við Frithleif um, hvørjir møguleikar kundu hugsast.

- Vit hava soleiðis funnið fram til eina loysn, har dagliga leiðslan á staðnum kemur at hvíla á Dakko og Jóan Henriki, sum eru gamlir í fyritøkuni.

### Kenslurnar

Við høvi nýtti Eyðfinn eisini møguleikan at takka undangongumanninum fyri góð ráð – og sum hann tók til:

- Nú er tað upp til okkum at vísa, at virksemið kann førast víðari uttan Frithleif. Í hesi stuttu tíð, meðan eg havi verið stjóri, havi eg merkt, hvussu kenslurnar fyri FJM hava ein stóran leiklut í tí dagliga. Samstundis havi eg merkt ein stóran áhuga fyri, at vit nú skulu arbeiða saman í samtakinum, soleiðis at best møguligt úrslit fæst burtur úr samlaða virkseminum.

Eyðfinn legði dent á, at eitt gott samstarv verður til gagns fyri allar partar – og ikki minst viðskiftafólkini